## Bilasølan steðgað

Danska bilasølan er nú minkað so nógv, at bilasølurnar hava ikki selt so fáar bilar síðani 2003. Tøl hjá innflytarafelagnum vísa, at persónbilasølan minkaði 31 prosent í august samanborið við sama mánað í fjør. Hjá teimum, sum selja vøruvognar, gekk uppaftur verri, tí tann sølan var heili 59 prosent minni enn í august í 2008. Tær donsku bilasølurnar ugga seg tó við, at tølini eru frægari nú enn fyrr í ár, tí tá keyptu danir næstan ongar bilar. Men glottarnir eru smáir, tí bilamarknaðurin er framvegis undir stórum trýsti orsakað av arbeiðsloysi og fíggjarkreppuni annars, sigur felagið.



## Ov nógvir tinglimir

Fyrradagin kunngjørdu Demokratarnir í Grønlandi, at teir vilja hava landsstýrið at kanna treytirnar fyri grønlendskum limaskapi í ES. Í gjár komu teir aftur við einum uppskoti, og hesaferð mælti flokkurin til at skerja tingmannatalið í Inatsisartut ella Landstinginum. Eftir galdandi skipan hevur Landstingið 31 limir, men Demokratarnir halda, at 25 hevði verið nóg mikið, og tað hevði eisini spart landskassanum einar tríggjar milliónir krónur um árið, sigur flokkurin sambært blaðnum Sermitsiaq.

# Eidesgaard: Bakbit frá Sambandinum

**Við útspælinum um at tiðna blokkin og fáa umleið 110 milliónir eyka krónur í landskassan økir Sambandið um trýstið á Eidesgaard, sum skal verja stóru skerjingarnar á komandi fíggjarlóg. Fíggjarmálaráðharrin kennir seg bakbitnan av Edmundi Joensen og kompaní**

RÍKISVEITING
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*



*Við útspælinum frá Sambandsflokkinum um at tiðna blokkin og vinna landskassanum 110 milliónir krónur økist trýstið á fíggjarmálaráðharran og javnaðarformannin Jóannes Eidesgaard, sum í komandi tíðum skal verja stóru sparingarnar yvir fyri veljarunum*

- Eg kenni hetta sum eitt bakbit frá Sambandsflokkinum.

So greiður er fíggjarmálaráðharrin, sum í gjár boðaði sínum danska starvsbróðuri frá, at árliga ríkisveitingin verður verandi óbroytt. Fráboðanin kom í Degi og Viku týskvøldið eftir hart samgongustríð seinastu dagarnar, tí Sambandsflokkurin fyrr í vikuni boðaði frá, at ríkisveitingin skuldi verið prístalsregulerað, soleiðis at hon fylgdi prísvøkstrinum í samfelagnum annars. Við afturvirkandi megi, tað vil siga um roknað verður aftur til 2002, tá fullveldissamgongan fastfrysti blokkin, kundi ein tílík prístalsregulering vunnið landskassanum um 110 milliónir krónur.

### Bakbit

Tann fyrra ABC samgongan varð samd um at varðveita hesa fastfrysting í 2004. Sambandsflokkurin hevur alla tíðina viljað tiðnað blokkin, men tað hava Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin ikki viljað. Báðir flokkarnir hava meldað út, at loysnin á trongu búskaparliga støðuni ikki er at biðja danir um størri blokkstuðul, og at útspælið frá Sambandsflokkinum haraftureat er í stríð við samgonguskjalið.

Nú stendur samgongan yvir fyri einum halli á komandi fíggjarlóg, sum fer at tátta í milliardina. Og stóra avbjóðingin hjá samgonguni verður at verja stóru skerjingarnar, ikki minst á vælferðarøkinum.

> *At Sambandsflokkurin og Edmund Joensen nú fara solo klokkan fimm minuttir í tólv, hevur gjørt samgonguna veikari*

Tí harmast fíggjarmálaráðharrin og formaðurin í Javnaðarflokkinum um framferðarháttin hjá sínum samgongufeløgum í Sambandsflokkinum. Jóannes Eidesgaard brúkar orð sum “bakbit” og undrast serliga á “timingina”, tá hann skal seta orð á ósemjuna.

- At Sambandið velur at koma við hesum útspæli, beint áðrenn fíggjarlógin verður løgd fram, og at Edmund nú fer solo klokkan fimm minuttir í tólv, hevur gjørt samgonguna veikari, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Trýstið økist

Javnaðarflokkurin er í tungum sjógvi í veljarakanningunum og fekk einans 14% í Gallup kanning fyri fáum vikum síðani. Flokkurin situr við fíggjarmálum, og nú stórar sparingar eru fyri framman, sum skulu verjast yvir fyri veljarunum, kann trýstið á flokkin økjast. Og við útspælinum frá Sambandsflokkinum kann Eidesgaard koma at standa meiri einsamallur, tá ákoyringarnar um skerda vælferð fara at skola oman yvir samgonguflokkarnar í komandi tíðum. Jóannes ásannar, at Javnaðarflokkurin stendur yvir fyri eini stórari avbjóðing.

- Lat meg siga tað soleiðis, at hetta hevur í øllum førum ikki linkað um trýstið á Javnaðarflokkin. Men hinvegin verður hallið somikið stórt, umleið 800 milliónir krónur, at ein prístalsregulering av blokkinum als ikki loysir teir trupulleikar, sum føroyska samfelagið stendur yvir fyri, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Skeiv tøl

Fíggjarmálaráðharrin undrast eisini á, at Sambandið uttan at blunka tosar um 110 milliónir eyka krónur í landskassan, um blokkurin varð tiðnaður. Men hendan upphæddin er einans røtt, um danir vóru sinnaðir at prístalsregulera blokkin við afturvirkandi megi heilt aftur til 2002, tá blokkurin varð frystur. Tað hevði verið ein samráðingarspurningur, og tað væntar fíggjarmálaráðharrin ikki, at danir høvdu verið sinnaðir til.

- Danir hava sjálvir eitt undirskot á 86 milliardir krónur og høvdu neyvan givið okkum meiri pengar, um vit nú boðaðu frá, at semjan frá 2004 skal broytast.



# Alfred etur orðini í seg aftur

**Mánakvøldið segði Alfred Olsen, at útspælið hjá Sambandsflokkinum um at tiðna blokkin var eitt krav. Men tey orðini tekur hann í seg aftur**

RÍKISVEITING
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Alfred Olsen tosaði um eitt “krav”. Kaj Leo Johannesen tosaði um eitt “ynski”. Spurningurin er so, hvørjum av hesum báðum sambandsmonnunum vit skulu trúgva. Formanninum í tingbólki Sambandsfloksins? Ella løgmanni og samgonguleiðara?

Tá Jóannes Eidesgaard í gjár boðaði danska fíggjarmálaráðharranum frá, at blokkurin verður verandi á sama støði, hingu orðini hjá Alfredi Olsen í Degi og Viku mánakvøldið framvegis í luftini. Formaðurin í tingbólkinum hjá Sambandsflokkinum svaraði nevniliga játtandi, tá hann varð spurdur, um útspælið hjá Sambandsflokkinum um at tiðna blokkin var eitt krav.

Um orðini hjá Alfred eru galdandi, so átti ABC samgongan nú at verið í eini stjórnarkreppu. Men tað er hon ikki, tí Alfred meinti eftir øllum at døma ikki tað, sum hann segði við sjónvarpið mánakvøldið.

- Í politikki er ongantíð klókt at seta ultimatum. Tingmanningin hjá Sambandsflokkinum er komin við sínum ynski um at tiðna blokkin, men tað fingu vit so ikki ígjøgnum, sigur Alfred Olsen.

Men var kravið so ikki eitt krav kortini?

- Nú hanga tit journalistar tykkum í hatta einstaka orðið. Nei, talan var ikki um nakað ultimatum, sigur Alfred Olsen.